# TILTØK

**Tíð til Gud**
verður í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Talari hesaferðer Dánjal av Rana. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14: Sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjakvøldið 23. mars kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bøn fyri samkomuni, Paulus.
Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11: Møti. Sofus Steingrund talar. Kl. 13.30: Sunnudagsskúli. Kl. 18.00: Møti. Major Tjåland talar.

**Ebenezer**
Sunnudagin: Kl. 10.00 minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin:
Morgunmøti kl. 11,
kl. 12.15 sunnudagsskúli,
kl. 18 evangeliskt møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 21.00 ungdómsmøti v/ Flemming Berg o.fl. Í morgin, leygardagin, kl. 9.30 seminar fyri juniorleiðarar, kl. 16.00 seminar Ny Generation. Sunnudagin kl. 11.00 morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 18.00 kvøldmøti v/ Flemming Berg. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Í kvøld kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 meinigheitsfundur, offurgongd.
Mánakvøldið kl. 19 LU-arbeiðið. Filmur: I skyggen af korset (2. partur). Kl. 20 venur Manskórið.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Leygarkvøldið kl. 20 opið hús fyri ungdóm.

Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, har Leif og Susanne Madsen úr Danmark, sum eru trúboðarar í Kenya, luttaka. Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Bahá'í Miðstøðin í Gundadali**
Øll møti eru fyribils avlýst vegna umvæling.

**Kirkjan í Hósvík**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Talarar Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnukvøldið kl. 18: Kvøldmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Mikudagin frá kl. 19–21.00: Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung.
Hósdagin frá kl. 16–17.30: Urtagarðurin, eitt trivnaðarstað hjá børnum í Hósvík, frá kl. 18–19.00: Bønarmøti.

**Hvalvíkar missiónshús**
Í kvøld 23. mars kl. 19.00: Hugnaløta fyri tey, sum vóru í Oberammergan august 2000, møtið fjølment.
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Møti við Anniku og Sigrið við familju. Innsavnan til húsið, kl. 20.00: Ungdómsmøti v/ ungdómi av Argjum.

**Karmel, Eiði**
Møti verður í kvøld kl. 20.00, Sørin Steinhólm talar, Jóhanna, Hallgerð og Marita syngja. Bønarløta er kl. 9.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Húsmøti verður á Skipanesi týskvøldið kl. 19.00 hjá Irenu & Martin.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Í kvøld kl. 20.30: Samkomufundur um páskastevnuna.
Leygarkvøldið kl. 21: Opið hús við Flemming Berg úr Danmark.
Sunnudagin kl. 17: Møti við Osbjørn og Eyðun. Barnamøti kl. 17.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 14.00. Onki møti. Mikudagin 28. mars: Bíbiltími kl. 20.00.

**Betania í Skopun**
Í kvøld kl. 20: Evangeliskt møti við Susanne og Leif Madsen.
Sunnudagin: Sunnudagsskúli - Bíbliuflokkur kl. 10.15, morgunmøti kl. 11 og kvøldmøti kl. 18.
Øll eru vælkomin.

**Zion á Sandi**
Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 13.30.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vegna konfirmatión verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin. Og vegna missiónsviku í Vági verður einki møti sunnukvøldið.

**Missiónshúsið í Vági**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 við Regini Høgnesen, kór úr Porkeri syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við Regini Høgnesen, kór úr Skopun syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnukvøldið kl. 18: Evangeliskt møti, Eingrím og aðrir tala. Sunnudagsskúli kl. 14.00.
Mánadagin kl. kl. 18.00: Heimaforbundið.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Lív og Dánial á Dul, einki ALPHA skeið.
Mánadagin 26. kl. 20 er møti við Leif og Susanne Madsen trúboðarar í Kenya. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
Sunnudagin 25. mars verður gongutúrur fyri Vestan. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 15. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Fríggjadagin 23.3.*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Losjan í Havn**
Í dag kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21.00 og kl. 22.30–23.30.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Javni N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og telduпostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*MBF Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 fax 310813*
*e-mail:*
*gikt@post.olivant.fo*
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin:
Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð:
Sára, tlf. 373106.
E-mail:
sara@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni**
*E-mail:*
*eliaskirkjan@get2net.dk*
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk

## Konfirmantar

Hesi verða konfirmerað á Tvøroyri sunnudagin 25. mars:
Búi Groth Mortensen, Øravík
Beinir Tordar Midjord, Trongisvági
Tórhild Brattalíð, Trongisvági
Beinta Maria Stórhamar Danielsen, Trongisvági
Brynhild Enni, Hvítanesi, Tvøroyri
Elisabeth Nina Hammerfoss Olsen, Undir Heygnum
Maria Steinkross, Trongisvági
Kristina Steinkross, Trongisvági
Kristina Kambskarð Sørensen, Hvítanesi, Tvøroyri
Sára Dimon Djurhuus, á Tippinum
Eyðbjørg Robertson, Tvøroyri
Eva Laursen, Sevmýri
Sára Michaelsdóttir Strøm, Trongisvági
Esther Leona Leonsdóttir Johannesen, í Støllum
Vivian Magnussen, Trongisvági



# FILMSTEIGURIN

## 15 Minutes

Øll hungra vit eftir hardcore sjónvarpstíðindum – tað er líka mikið um vit tosa um kriminell, løgreglufólk, advokatar ella politikarar. Øll vilja vera løgd til merkis, vera berømt, víðgitin. Drápsmenn seta miðlaráðgevar, tá teir seta í scenu teirra játtan í bestu senditíð í sjónvarpinum. Horur, lummatjóvar og advokatarnir hjá forsetanum arbeiða á sama hátt - í kalda ljósinum – spotlights. Tað snýr seg um at síggjast.

Mitt í øllum hesum meldrinum verður Jordy Warsaw, ungi sløkkiliðsmeistari, tilkallaður til nakað, sum við fyrsta eygnakast tykist vera ein syrgilig vanlukka. Eitt ungt par liggur sum uppkolað lík í tí, sum eftir er av íbúð teirra, og løgreglan er longu har. Eddie Flemming, detektivur, (Robert De Niro) er ein ekta miðla-superstar, og fjølmiðlarnir flokkast um hann. Hann letur teimum vøruna. Hvørja ferð. Men hann verður skjótt greiður um, at hetta málið hevur brúk fyri serligu serfrøðini hjá Warsaw. Hann finnur kortini skjótt út av, at »vanlukkan« helst skal fjala tvey brutal morð. Tað vísir seg, at vinirnir hjá





myrda manninum, brádliga møta upp, meðan teir eru á feriu.

Ein gamal roknskapur er uppgjørdur, og ein tíðsinnstillað bensinbumba hevur klárað restina. Emil Slovak er ein reindyrkaður psykopatur við temperamangi, sum fær nitroglycerin til at virka sum matsherry…

Fylgisneyti og medskyldugi hansara, Oleg, hevur ein lívslangan dreym um at uppliva USA, har allir teir praktfullu filmarnir, hann minnist frá barndóminum, vórðu til. Hann stjelur eitt digikamera, og so fær teir at taka upp warsaw og Flemming finna út av, at teir faktiskt eru vitni til tvey tey fyrstu morðini, , men tað er klárt, at tey blóðugu sporini, teir seta í býnum.

Men tað er greitt, at hennara lív hongur í klønum tráð, soleingi Emil og Oleg ganga leysir í gøtunum.

Skjótt renna lógarinnar umboðsmenn saman við psykopatarnar. Teir koma so nær hvørjum øðrum, at øri heilin hjá Emili fer at hugsa illar tankar. Hansara logiski sansur skrásetur, at eingin í amerikanska samfelagnum hevur ábyrgd av tí, hann ger, tá sinnissjúka í gerningsløtuni frítekur teg fyri revsing… Tað man kunna brúkast til okkurt skilagott…

Og so verður teir jagstraðir og jagstraðir í staðin!

## Dr. T

Sullivan Travius, doktari, svimur bókstaviliga sagt í kvinnum. Og hann elskar kvinnur. Sjalvt byrsan hjá honum er uppkallað eftir eini kvinnu. So hann er sjálvandi í teirri idéellu støðu, sum society gynækologur í Dallas.

Ikki tað, at Dr. T – sum hann veður nevndur – misnýtir starv sítt á nakran hátt. Tann vakri og búni læknin er síni perfektu konu, Kate, trúgvur og ein elskaður pápi fyri sínar tvær vaksnu døtur. Men fyrr ella seinni má perfektionin jú enda – og tað ger hon.

Fyrst flytir tann rættuliga alkoholiseraða svigarinnan inn við sínum larmandi børnum, so fær Kate eitt nervøst samanbrot og leypur í springvatnið í sølumiðstøðini – uttan baðidrakt, ja, uttan ein einasta tráð á kroppinum. Samstundis klandrast døtrarnar um brúdleypið hjá stjórusystir – serliga um hana, hon hevur valt til brúðargentu.

Samstundis er kona besta vin Dr. T farin at ganga dagliga á klinikkina hjá honum til kanningar, klinikkassistenturin hjá honum sigur, at hon elskar hann, og í klubbanum hittir hann vøkru Bree, sum er golfvenjari, og sum júst hóskar til Dr. T.

Sum tann kvinukæra gynækologin síggja vit Richar Gere, sum í hesum filminum vá viðganga, at hansara víðgitna sjarma gevur honum fleiri trupulleikar, enn gott er. Robert Altman hevur leikstjórnað – og givið honum strálandi kvinnumótspæl við eitt nú Helen Hunt, Farrah Fawcett, Liv Tyler, Shelley Long, Tara Reid og Kate Hudson.





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 23.03. | kl. $20^{15}$ | Fríggjadagin | 23.03. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 24.03. | kl. $20^{15}$ | Leygardagin | 24.03. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 25.03. | kl. $20^{00}$ | Sunnudagin | 25.03. | kl. $22^{15}$ |

**www.in.fo/havnarbio**

# HAVNAR BIO

☆ Tlf. 311956 ☆




**Frumsýning**
Fríggjadagin 23.03. kl. $23^{00}$ Leygardagin 24.03. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 25.03. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 23.03. kl. $20^{45}$ Leygardagin 24.03. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 25.03. kl. $19^{30}$




Leygardagin 24.03. kl. $18^{00}$ Sunnudagin 25.03. kl. $17^{15}$